# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## GEKKO GER COMEBACK

Hósdagin verður filmurin Wall Street 2 frumsýndur kring heim heimin. 23 ár eru liðin, síðani Michael Douglas var í leiklutinum sum Gordon Gekko. Hendan leiklutin vann hann eina Oscar fyri. Nú er Gekko komin úr geglinum aftur, og hann kemur í samband við versonin hjá sær, hóast hann einki samband hevur havt við dóttir sína í nógv ár. Og tað samanspælið verður fløkt. Shia Le Beouf er í leiklutinum sum versonurin, sum sær upp til meistaran á Wall Street.

**WALL STREET 2**
Biograffilmur
Frumsýndur 30/9



## GOYMA VINDIN

Jarðfeingi skipar fyri ráðstevnu um goymslu av vindorku. Ráðstevnan vendir sær til til øll, sum hava áhuga fyri orkuspurningum. Ráðstevna um vindorku. Føroyar eru farnar undir eina miðvísa gongd at minka um oljunýtsluna. Hetta krevur ein munandi vøkstur í elframleiðslu frá varandi orkukeldum. Í Føroyum er í høvuðsheitum talan um vatn og vind, sum tó í sær sjálvum hava avmarkingar.

**RÁÐSTEVNA UM VINDORKU**
Norðurlandahúsið
Týsdagin 28/9 og Mikudagin 29/9



## BAMSE Í HAVN

Leyagrkvøldið spæla Bamses Venner til dans í Havn. Síðani Bamses Venner byrjaðu at syngja í 1973, hava teir verður støðugt frammi, givið tónleik út og spælt til øll hugsandi tiltøk. Millum kendu sangrirnar hjá Bamse eru »I En Lille Båd Der Gynger«, »Venner Kom Og Se«, »Tænker Altid På Dig«, »Har Du Lyst« og »Elsker Kun Dig«.

**BAMSES VENNER**
Dansur í ítróttarhøllini á Hálsi
Leygarkvøldið 25/9



## EMINEM FRAMVEGIS ILLUR

Rapparin Eminem hevur upplivað fleiri upp- og niðurtúrar, enn tey flestu gera. Og nú er hann komin afturíaftur við nýggjari fløgu. Eminem ljóðar framvegis sum Eminem. Eyðkendi og ofta illi rappstílurin er gjøgnumgandi á hesi fløguni, sum eisini bjóðar góð løg og niðurløg.

**EMINEM**
Recovery

## HEVNARIN ÚR ULSTER

Allan Bradley hevur skrivað eina øðrvísi krimisøgu á markinum til tað absurda. Søgan er um 11 ára gomlu Flavia de Luce, sum býr saman við familju síni á einum garði. Hon hevur serlig áhugamál – eitur og evnafrøði. Tá ið fremmandur maður doyr á garðinum, ætlar hon sær at uppklára drápið.

**ALLAN BRADLEY**
Flavia de Luce og hævneren fra Ulster
Rit & Rák






## RÁS2 SPYR FYRITØKUR

Rás2 fer í vetur at hava spurnarkapping fyri fyritøkur, virki og stovnar. Firmakappingin verður í ár skipað sum økiskapping við eini landsfinalu. Kappingin verður skipað í fimm lokaløkið, og vinnarin í hvørjum lokaløki kemur víðari til eina landskapping, har øll dystast ímóti hvørjum øðrum. Síðani skulu tvey tey bestu virkini dystast í eini størslignari finalu. Tilmelding kann gerast á firmakapping@ras2.fo.

**FIRMAKAPPING**
Rás2 í vetur



## TÁ FYRRA HEIMSBARDAGI ENDAÐI

Fyrri Heimsbardagi endaði klokkan 11 tann 11. November 1918. Kríggið kostaði 9 milliónum hermonnum lívið. Men hvat hendi seinastu tímarnar, áðrenn vápnahvíldin kom í gildi? Michael Palin hevur ferðast í Frakland og Beglia, har bretskir, amerikanskir, farnskir, kanadiskir og týskir hermann bardust til tað seinasta.

**SEINASTI DAGUR Í FYRRA HEIMSBARDAGA**
BBC-dokumentar
DR2 sunnukvøldið 26/9 kl. 20.00